Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Føroyamálsdeildin
Department of Language and Literature

# Skeiðslýsing *Course description*

## Heystið 2018

**Skeiðsnummar** *Course number*: 1358.18

**ECTS** *ECTS*: 10

**Ábyrgd** *Contact*: Anfinnur Johansen, anfinnurj@setur.fo

| | |
|---|---|
| **Stig**<br>*Level* | BA |
| **Heiti**<br>*Title* | Ættarnavnafrøði (BA) |
| **Endamál**<br>*Aim* | At studenturin fær grundleggjandi vitan um ættarnavnafrøði frá elstu tíðum til í dag. |
| **Innihald**<br>*Content* | Í hesum lestrarevni verður farið ígjøgnum eftirnavnagávuna frá elstu tíðum til í dag. Tað elsta var at skoyta -son ella -dóttir upp í faðirsnavn og við hvørt móðurnavn. 30. mai í 1828 varð útgivin konglig fyriskipan, sum hevði tað við sær, at -sen-nøvn, sum tá vóru, gjørdust føst eftirnøvn. Í 1904 kom donsk lóg í gildi um navnabroyting. Hon gav heimild til at skifta ættarnavn. Í undirvísingini verður gjølla farið ígjøgnum faðirsnavnasøguna, ættarnøvnini serstakliga úr 19. og 20. øld, teirra bygnað, uppruna, skriftsnið o.s.fr., umframt ættarnavnalóggávu. Nomið verður eisini við millumnøvn umframt viðurnevni, sum ofta eru vorðin ættarnøvn. |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>*Learning and teaching approaches* | Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Floksundirvísing og studentaframløga. |
| **Próvtøkuháttur**<br>*Assessment method* | Skrivlig próvtøka í 6 tímar. |
| **Lestrarlisti**<br>*Literature* | Lisnar verða greinir og ritgerðir um ættarnavnafrøði. |
| **Læruúrtøka**<br>*Learning outcomes* | Tá ið skeiðið er lokið, hevur studenturin<br>● fingið grundleggjandi ástøðiliga vitan um at greina ættarnavnafrøði<br>● fingið grundleggjandi kunnleika at meta um og greina ymiskar ættarnavnagávuhættir<br>● fingið grundleggjandi vitan um at greiða frá viðurnevnum<br>● fingið grundleggjandi vitan um at greiða frá millumnøvnum<br>● fingið grundleggjandi vitan um at lýsa ættarnavnalóggávu |

| | |
|---|---|
| | Studenturin skal hava staðið fyrra part av BA í føroyskum ella samsvarandi. Til ber eisini at taka skeiðið sum stakskeið við øðrum fortreytum (víst verður til galdandi námsskipan). |
| **Próvdøming**<br>*Examination* | Uttanhýsis |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Galdandi próvtalastigi |